

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 11 - 2012

# Statoil skal selja gass fyri 100 milliardir krónur

Statoil hevur skrivað undir eina avtalu við Wintershall um at lata Týsklandi og øðrum londum í útnyrðingspartinum av evropeiska meginlandinum tilsamans 45 milliardir rúmmetrar av gassi tey næstu 10 árini. -Týskland er ein týðandi marknaður fyri okkum, og Wintershall er eitt av okkara bestu viðskiftafeløgum, sigur Statoil-stjórin, Helge Lund, við Aftenposten. Hann vísir á, at tær stóru ídnaðarfyritøkurnar í Týsklandi leggja seg eftir at brúka gass í framtíðini, og at hevur týdning fyri at røkka málinum um minni CO2-útlát. -Avtalan vísir, at norskt gass hevur gott kappingarføri, sigur Helge Lund. Statoil-stjórin lýsir avtaluna sum eina av teimum stóru, tí við dagsins gassprísi er hetta ein avtala fyri á leið 100 milliardir krónur. Statoil er tann næststørsti gassveitarin í Evropa, og felagð hevur leingi verið virkið á týska gassmarknaðinum. Norska gassið fer ígjøgnum tvær leiðingar, sum koma upp á land við Dornum og Emden í Norðurtýsklandi.